# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Javnaðarflokkurin størsta trupulleikan

Hóast sissandi útmeldingar er greitt, at samgongan er komin í trupla støðu. Tað er ikki bara Gerhard og hansara mál, okkurt kundi bent á at trupulleikar eru við øðrum samongulimum við. Hesir trupulleikar kunnu hava nakað at gera við tunnilsmálið eins væl og við fiskivinnumálið.

Største trupulleikan í løtuni hevur tó Javnaðarflokkurin og í skrivandi stund vita vit ikki, hvussu flokkurin fer at takla málið um Gerhard Lognberg. Javnaðarflokkurin hevur í síni drúgvu søgu ikki verið heppin við handfaring av slíkum málum. Í tríati árunum vórðu ein av stovnarunum, fyrstvaldi tingmaður, skaldið, tónlistamaðurin og fyrsti blaðstjóri á Sosialinum, M.S.Viðstein og ein bólkur saman við honum útreinskaðir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Orsøkin var ein álvarsom ideologisk ósemja, sum um sama mundið var í øllum norðurlendskum javnaðarflokkum. Við hesum misti Javnaðarflokkurin ikki bara sín radikala vinstra- og sjálvstýrisvong, men hann misti eisini undirtøku í Suðurstreymoy, sum tað tók mong ár at vinna aftur.

Í 1946 atkvøddi javnaðartingmaðurin Jákup í Jákupstovu fyri loysing, og flokksleiðslan svaraði við eksludera hann. Í áttatiárunum var rok í flokkinum á Tvøroyri, har royndir vóru at ekskludera tann atfinningarsama fakfelagsmannin Dánjal av Rana. Hetta mál endaði við, at Dánjal var verðandi í flokkinum, men sonurin stovnaði nýggjan flokk, ið hevur givið Javnaðarflokkinum nógvar trupulleikar. Hetta mál nam ikki bert við á Tvøroyri, men elvdi til trupulleikar í flokkinum um alt landið. Í 1992 var Jóannes Dalsgaard, um ikki beinleiðis ekskluderaður, so gingin, og flokkurin misti enn einaferð tann radikala vinstravong, ið einhvør javnaðarflokkur kann hava stórt gagn av.

Verður søga Javnaðarfloksins sæð undir einum yvir eitt áttati ára skeið, so hava eksklusiónir ikki gagnað flokkinum. Heldur er tað tvørturímóti. P.M. Dam, sáli, skal á eldri árum hava sagt, at við M.S. Viðstein og Jákupi í Jákupstovu misti flokkurin so nógv, at eksklusiónirnar gjørdu meira skaða enn gagn. Í dag munnu flestir søgufrøðingar geva honum rætt. Eksklusión er ein revsing, sum setir djúp sár, ið eru mestsum ólekilig. Flokksleiðslan eigur tí at hugsa seg væl um, áðrenn hon ekskluderar Gerhard. Leiðslan eigur eisini at hugsa um, at í hesum tíðum, har javnaður og tjóðveldi yvirhála borgarligu flokkarnar í neoliberalistiskum útmeldingum, er Gerhard í veruleikanum ein av teimum fáu, ið enn talar sum teir gomlu javnaðarmenninir. Her verður sjálvsagt ikki hugsað um tunnilsmálið, men um, at Gerhard Lognberg tykist vera einasti tinglimur Javnaðarfloksins, sum ikki hevur gloymt Pallaba og Marsonnu. Tað eigur at vera pláss fyri Gerhardi í flokkinum eisini eftir dagin í gjár. Um tað hinvegin ikki verður rúm fyri Gerhardi, so standa vit eftir við myndini av einum toppstýrdum og lítið demokratiskum flokki, sum einki hevur lært av síni egnu søgu. Floksleiðslan ger í klókt í at hugsa seg væl um.

**Sosialurin**

## Deyðadómur

**AUÐUNN KONRÁÐSSON**
Formaður í Meginfelag Útróðrarmanna

Meðan flestu borgarar í Føroyum hugnaðu sær, antin á ólavsøku í Havn, ella fylgdu við á okkara tjóðarhátíð í útvarpinum, var veruleikin ein annar fyri okkum sum liva av útróðri og fiskiskapi.

Vit hava einki at hátíðarhalda.

Føroya løgmaður helt sum vant sína ólavsøkurøðu. Har stóð hann í sínum fínasta skrúð og í nøkrum fáum reglubrotum legði hann okkara høvuðsvinnu í oyði. Tilmælið frá sitandi samgongu er at minka fiskidagarnar við 50% fyri línuveiðuna og 20% fyri trolveiðuna. Veruleikin er tann at hetta inntriv tekur grundarlagið undan største partinum av flotanum.

Útróðrarflotin er longu skerdur við uml. 30% síðani fiskidagaskipanin kom í gildi. Hendan skerjing hevur tyngt um raksturin, tí eigararnir hava verið noyddir at keypa teir dagar íð resta í. Nýggja uppskotið hjá Torbjørn Jacobsen og samgonguni tekur fullkomiliga grundarlagið undan øllum útróðrarflotanum og helst undan línufiskiskapinum sum heild.

Løgmaður segði so elegant at um nøkur ár kunnu vit fiska 30.000 tons av toski. Eg vil gjarna hava at hann setur eitt áramál á nær hann væntar at hetta verður veruleiki. Royndirnar aðrastaðni vísa ikki hetta úrslit, um "vísindaliga " ráðgevingin verður fylgd. Taka vit okkara nærmasta granna, Ìsland, sum dømi, so var toskaveiðan uml. 440.000 tons tá íð byrjað var at "stýra" veiðuni. Fyrsta stigið var økisfriðingar, dagar har einans var loyvt at fiska ávísan prosentpart av toski og síðani kvotur. Ùrslitið er at í dag er loyvd toskaveiða einans 130.000 tons.

Verður hetta úrslitið roknað um til føroysk viðurskifti verður toskaveiðan undir Føroyum uml. 8000 tons um 25 ár. Hvat er so vunnið.

Tá avmarkingarnar vóru settar í gildi, í byrjanini av 80. árunum lovaði táverandi íslenski fiskimálaráðharri at í 1992, kundi íslenski flotin fiska í miðal 500.000 tons av toski um árið.

Føroya løgmaður sær út til at vera endaður í somu grøv.

Tað hevur ligið í luftini at vit eru á veg inn í eina búskaparliga niðurgongd, men at *verandi samgonga fór at lóggeva okkum inn í eina kreppu*, droymdi sjálvt ikki tann mest svartskygdi um.

Løgmansrøðan innihelt fleiri vøkur lyfti um meiri játtanir til gransking, skúlar, tunnlar og annað. Hetta verður gjørt samstundis sum fíggjargrundarlagið hjá landskassanum verður minkað við 30-40%. Tað skal ein størri roknimeistara en tann vanliga føroyingin til at fáa tað at hanga saman.

Tað er sera hugstoytt at tað skuldi vera ein samgonga, skipað av "verkamanna og fiskimannaflokkunum" íð setti hesi øru tiltøk í verk.

Fráboðaðu inntrivini vátta tann illgruna vit longi hava havt, at landsins kosnu menn og kvinnur skilja ikki fiskidagaskipanina. Ein av grundarsteinunum í skipanini er at tað einasta sum kundi broyta talið av tillutaðum fiskidøgum var øking í veiðuorku. Upprunaliga var skipanin ein javnvág millum stongd gýtingarøkir, ymisk veiðuøkir fyri teir ymisku bólkarnar, økir stongd fyri trolveiðu, teyr ymisku skipabólkarnar og so fiskidagarnar. Hesa grundhugsan hava okkara politikarar kastað fyri bakka og úrslitið er tað at uppskotið í løgmansrøðuni fer at forkoma skipanini. Minkning í fiskidøgunum sær út til at vera ein heilivágur sum dugir til alt. Trupulleikin í skipanini er at stórar forskjótingar hava verið í bólkunum, hetta verður ikki rættað við at skera fiskidagarnar yvir ein kamb.

Áhugavert verður at síggja hvørjir peningastovnar verða áhugaðir í at fíggja keyp av døgum í eini vinnu sum kann vænta at verða skorin við tíggjutals prosentum á hvørjum ári og harafturat skal lata fiskiloyvini inn til landið í 2018. Eisini skal havast í huga at tey økir í landinum sum verða harðast rakt, hava ikki nakað at bjóða teimum íð verða arbeiðisleys tí arbeiðið minkar eisini í øðrum vinnum orsakað av vantandi fígging og niðurgongdini í samfelagnum annars. Sviðin kemur at kennast í kommunu og landskassanum um fiskimennirnir í Føroyum skulu gerast arbeiðisleyir eftir einari nótt av politiskum áðum.

Hesi árini síðani kreppan hasaði av hava alt fleiri røddir verið frammi um at okkara høvuðsvinna, fiskivinnan, forðar øðrum vinnum í at mennast. Skilji tað hvør íð kann. Hendan áskoðanin sær út til at hava vunnið frama á politiska pallinum. Nú hevur tað eydnast at høggja tað beinið av sum vit hava staðið á, uttan at nakað er komið í staðin fyri høvuðsvinnuna.

Samgongan hevur lóggivið Føroyar á knøini við hesum deyðadómi yvir føroysku fiskivinnuna.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.